# Gamla Sílið á Fjordbris Hotell

Eitt tað fyrsta tey sum koma til Fjordbris Hotell leggja til merkis, er ein føroyskur kappróðrarbátur sum stendur í túninum. Talan er um 5-mannafarið Sílið, sum Havnar Róðrarfelag átti. Orsøkin til at báturin stendur har er at Jenny Mehus sum ung róði við Sílinum og var við til at vinna tvey føroyameistaraheiti tvey ár á rað við júst hesum bátinum, í 1974 og 1975. Tá Havnar Róðrarfelag fyri nøkrum árum síðan setti bátin til sølu, keyptu Jenny og maðurin, Kjetil Mehus, bátin, sum tey hava ætlanir um at seta í stand.






















